Norskt tilboð til føroyingar:

Keyp teg ríkan og lat hini gjalda

Stutt fyri jól tók seg upp ein »nýggjur« handilsmáti í Føroyum. Multilevelmarketing, ella netverkssøla, eitur hátturin og er hann púra lógligur, verður sagt av Fútaskrivstovuni. Men tann, sum fer upp í netið, bindur seg til at keypa fyri ávísa upphædd hvønn mánað

Sveinur Tróndarson

Fyri eini tíð síðani fekk Føroya Landfúti klagu um, at ein útlendsk fyritøka var farin at selja vørur sínar á ein hátt, sum minti um pyramiduspælið.

Eftir at hava hugt eftir søluháttinum, hevur fútin svarað, at fyritøkan, sum í hesum føri er Nature´s Own, einki skeivt ger, tí talan er um ein fult lógligan handilshátt, sum eitur »multilevelmarketing«, ella netverkssøla.

Finn Ougaard, varafúti sigur við Sosialin, at hesin háttur er vælkendur eitt nú í Danmark, og at hann hevur púrt einki við pyramiduspælið at gera.

– Í Danmark er lógaruppskot lagt fram um at forbjóða pyramiduspælinum, men í viðmerkingunum til ta uppskotið verður sagt, at júst netverkssøla er undantikin forboðnum, tí hetta er ein handilsháttur, har tú ført nakað fyri tað tú letur inn í peningi, sigur Ougaard.

Hann sigur eisini, at teir trúðu, at framferðarhátturin var brot á lógina um almenna innsavnan, men so er heldur ikki sigur hann nú.

Kenna seg kroystam

Kortini eru nógv, sum ávara ímóti søluháttinum. Fólk, sum Sosialurin hevur tosað við siga, at tey kendu seg kroystan at fara upp í, tí hjá tí, sum fyrst kemur inn í skipanina ræður um, at fáa fólk afturat sær fyri at fáa pening burturúr.

– Tann, sum fer uppí, bindur seg til at keypa fyri ávísa upphædd, sum ikki er so lítil, og koma ongar inntøkur, so er peningurin mistur, sigur ein kvinna, sum vit hava tosað við og hon leggur afturat, at tað eru tey, sum standa ovast, sum fáa vinningin, meðan tey, sum eru niðast, standa eftir við ongum.

Skipanin við netverkssølu, er nógv brúkt úti í heimi, men er rættuliga ókend her um okkara leiðir.

Kortini tykist hon nú hava gjørt innrás í Føroyum, tí eftir bert góðum hálvum øðrum mánað eru 85 føroyingar farnir upp í ketuna

Hvør orsøkin er, skulu vit ikki gera av, men vit fara kortini at gita, at vinningurin, sum hvør einstakur fær lovaðan er ein teirra.

Skaðar smáhandlarnar

Er søluhátturin ókendur í Føroyum, so er hann vælkendur t. d. í Noregi.

Í einum av norsku bløðunum stóð fyri kortum at lesa, at Nature´s Own í fjør seldi fyri umleið 70 mió. krónur í Noregi, og at umleið 15.000 fólk vóru í norska netinum.

Tá so nógv fólk fara upp í eitt net fyri at keypa, so er eisini ein vandi fyri, at tað fer at ganga út yvir smáhandlarnar úti á bygdunum. Hetta er eisini nakað, sum er komið okkum fyri oyra.

Handilsfólk, sum vit hava tosað við, siga, at tað er avmarkað hvussu nógv fólk brúka av sápu, kosttilskoti og luktilsi um mánaðin. Tí fer tað at síggjast aftur, attey keypa fyri fleiri hundrað krónur um mánaðin uttanlands.

Men fyri tað er skipanin, og handilshátturin, lógligur, verður sagt av fútaskrivstovuni.

Men kortini er tað onkur, sum kemur at standa, sum taparin, tí ytstu liðini í ketuni, sum ikki fáa nakran afturatsær vera tey, sum missa, og tey eru ikki so fá.

Alt fleiri nýta høvið at keypa beinleiðis frá framleiðaranum, sum í hesum føri situr í Svøríki. Samstundis eru eisini alsamt fleiri, sum seta spurnartekin við søluháttin, sum ger lívið hjá smáum handilsrekandi súrt. Jú meiri kundarnir keypa frá Natures Own, jú minni verður keypt í føroyskum handlum, og hesum ávara handilsmenn ímóti

Modelmynd

Multilevelmarketing ella netverkssøla



Soleiðis hongur skipanin saman, sum eitur »multilevelmarketing«. Tann ovasti í ketuni, sum eisini bindur seg til at keypa frá fyritøkuni, fær tvey afturat sær, sum fáa tvey afturat sær ... Fyrsta liðið í ketuni fær provisión frá fyritøkuni, fyri øll tey, sum viðkomandi fær undir seg. Fyri hvønn persón, sum verður lagdur afturat, vera latin »stig, sum síðani verða umroknað til pengar. Á henda hátt kann viðkomandi koma at forvinna rættuliga stórar upphæddir - sigst!. Men longur niður ketan breiðir seg, jú størri er vandin fyri at eingin er eftir at fáa afturat, og við eitt er eingin vinningur at fáa, men bara útreiðslur. Men fyri tað er framferðarhátturin púra lógligur og hann er sera væl kendur uttanlands

Netverkssøla og Nature´s Own

Natures Own var fyrsta evropeiska fyritøkan, sum tók til sín nýggja amerikanska søluháttin og var tað í 1994. Umsetningurin er sambært fyritøkuni fýrafaldaður seinastu tvey árini

Sveinur Tróndarson

Netverkssøla hongur soleiðis saman, at ein fyritøka fær ein persón at keypa fyri eina ávísa upphædd einaferð (t. d. 1.600 krónur) og síðani fyri ein ávísa upphædd um mánaðin (t. d. 600 krónur).

Hesin persónurin fær síðani tveir persónar, sum á sama hátt, sum hann sjálvur, gera sáttmála við fyritøkuna.

Fyri nýggju keypararnar, sum ein fær afturat sær, verða givin stig til tann, sum hevur fingið tey upp í netið.

Sambært upplýsingum frá fyritøkuni verða latin stig fyri hvønn einstakan keypara, sum kemur inn í netið, og fyri hvussu nógv viðkomandi keypir fyri.

Stigaskipanin er skrúvað saman á ein heilt serligan hátt, men tað stutta av tí langa er, at tað mesta, ein kann fáa burtur úr hvørjum beini er 4500 stig. Hetta svarar til góðar 9.000 krónur um vikuna, so tað eru ikki smávegis upphæddir, talan er um.

Sum vit skilja á Guðbjørg Jóhannesardóttir, tænastufulltrúa hjá Natures Own, er tað ikki vanligt, at so nógv verður goldið, tí hetta krevur ógvuliga nógv arbeiði, tí allir keypararnir, sum eru undir tær, skulu vera aktivir, fyri at tú kanst fáa stig burtur úr teimum.

Byrjað í USA

Sum so mangt annað byrjaði netverkssølan í USA seinast í 70-árunum. Smátt um smátt vann søluhátturin frama, og mitt í 80-árunum tóku evropearar hann til sín.

Nature´s Own byrjaði í 1994 at selja á henda hátt og í dag vera allar vørur hjá fyritøkuni seldar so.

At søluhátturin virkar, ber umsetningurin boð um, tí í 1997 var umsetningurin hjá Nature´s Own góðar 60 mió svenskar krónur. Í 1998 var hann vaksin til 138 mió. og í ár væntað tey, at hann fer at nærkast teimum 300 mió. krónunum.

Sambært upplýsingum frá fyritøkuni eru 85 føroyingar inni í netverkinum hjá Nature´s Own.

Inntøkan, sum persónarnir fáa eru skattskyldug, og upplýsingar verða sendar skattavaldinum eina ferð um árið, verður sagt úr Svøríki.

Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin

Fríggja-og leygarkvøldið spæla

FIMMBOÐI LISBERG OG VINIR

Kaggin Kaggin Kaggin

www.kaggin.fo

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING

v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn

TAXA

MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI

288888

FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799

KLUBBADANSUR

Leygarkvøldið spæla

Driv

AUTO

- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -

Skalt tú bil hýra - so er tað 311234

AUTO

BENZIN DIESEL KIOSK - ALTDØGNIÐ -

AUTO 311234

fk Matseðilin

Hósdagin 6. jan. Revelsben

Fríggjadagin 7. jan. Wienersnitzel

Leygardagin 8. jan. Rivjasteik

Mánadagin 10. jan. Grýturættur

Týsdagin 11. jan. Bostonsteik

Mikudagin 12. jan. Stokt flesk

Kostnaður 30,- kr

***

Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:

Juniorburgari 14,95

Maxiburgari *ella* Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

Í BÝIN

Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum

sosialurin

www.sosialurin.fo

CAFÉ NATÚR

* * *

Staðið har vit hittast

***

NÁTT-BUSSURIN

v/ Øssur Christiansen

Leygarkvøldið:
- Úr Vestmanna kl. 24
- Úr Tórshavn kl. 01
- Úr Vestmanna kl. 04
- Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

THE DUBLINERS

Aldarinnar konsert 08. januar 2000 í høllina á Hálsi

Sølustø›ini eru hesi:

Nor›oyggjar:	Statoilstø›in í Klaksvík Kioskin hjá Ann
Eysturoy:	Shellstø›in í Gøtudali Statoilstø›in í Skálabotni
Streymoy:	Shellstø›in í Vestmanna Kunningarstovan í Havn 3´arin í SMS
Sandoy:	Shellstø›in á Sandi
Su›uroy:	Shellstø›in á Tvøroyri Shellstø›in á Bakka í Vagi
Nólsoy:	Matvørubú›in

Alive Music

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi

Leygarkvøldið 8/1 spæla "FLÚRAR" til dans

Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

TAXA

MINI BUSS 3X21

Lýsið í sosialinum

Vilja tygum vi› í

Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur